# Stórur áhugi fyri tunglyndi

**TUNGLYNDI**

**Seinastu mánaðirnar hevur Sinnisbati gjørt eitt átak fyri at upplýsa um tunglyndi. Í farnu viku var túrurin komin til Suðuroyar**

Snorri Brend




*Regin Jóanesarson úr Vestmanna dugdi vœl at greiða frá síni sjúku. – Tað lættir um, tá ein sleppur at fortelja frá um depressjón, segði hann*




*Omanfyri 100 fólk høvdu leitað sær í Skúladepilin í Hovi at luttaka í fundinum hjá Sinnisbata*

*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Hov:** Høllin í Skúladeplinum í Hovi var fullsett av kvinnum og monnum, sum vildu vita meiri um sjúkuna tunglyndi, ið rakar ein stóran part av fólkinum. Á fundinum sang Eyðun Nolsøe nakrar áðrenn sangir, áðrenn Regin Jóanesarson úr Vestmanna greiddi frá, hvussu tað er at liva við tunglyndi. Skilligt var, at hetta evnið hugtók áhoyrararnar.

Eftir hetta fekk Tormóður Stórá, sálarlækni orðið, har hann greiddi frá um sjúkuna og hvørjir viðgerðarmøguleikar eru tøkir fyri tunglyndisrakt.

Aftaná hesar framløgurnar var høvið hjá teimum omanfyri 100 áhoyrarunum at seta fram spurningar og annars gera viðmerkingar til evnið.

Á fundinum kom fram, at einir 2500 føroyingar eru merktir av tunglyndi so ella so í dag. Helst er hetta orsøkin til, at høllin í Skúladeplinum var fullsett, eins og støðan hevur verið á øðrum støðum kring landið eisini. Hesir fundirnir kring landið er partur av endamálinum hjá Sinnisbata, sum er at upplýsa og seta orð á hvat sálarsjúka er.




*Nýggi bygningurin her við Vatnið í Vági tekur seg vœl út í landslagnum*

# Tvey fyri eitt

**Vágur:** Tað verður eitt stórt framstig fyri tey eldru og tey sinnisveiku, tá ellis- og røktarheimið, saman við økisdeplinum fyri sinnisveik verður liðugt.

Henda verkætlanin fevnir um eina samanbygging av tveimum stovnum omanfyri Vatnið í Vági.

Ellis- og røktarheimið verður góðar 2500 fermetrar stórt og fer at hýsa 24 búfólkum, meðan økisdepilin til sinnisveik verður góðar 1400 fermetrar stórur og fer at hýsa 8 búfólkum og tveimum umlættingarplássum.

Bygningurin er soleiðis innrættaður, at økisdepilin fer at halda til í niðaru hæddini og ellis- og røktarheimið í teimum báðum ovaru hæddunum. Tað eru fýra tær sunnastu kommunurnar í Suðuroynni sum fíggja hetta.

Sambært heimasíðuni hjá landsverki er kostnaðurin mettur til 57 mió krónur, har økisdepilin kostar 23 mió krónur.

*snorri@sosialurin.fo*


www.vagur.fo




Vælkomin til Vágs

VÁGS KOMMUNA

Vágsvegur 22 | FO-900 Vágur | Tel. 733000 | vagur@vagur.fo